## VIÐMERKINGAR

# Landsverk og aðrir myndugleikar kunna tit verða hetta vaksnir…?

JÓNFINN OLSEN
Miðvágur



Elektoniskt skeltir er nú blivið loysnin, ja tað sær soleiðis út. Serstakliga nú Norðoyartunnilin er lætin upp.

Fyri langari tí síðan (nov. – des. 2004) skrivaði undirritaði brævtil Miðvágs Kommunu um ferðsluna í gjøgnum Miðvág, her sum so nógv óhapp eru hend, bæðið fólkaliga og matrielt, spurningurin er nú, hvørji næstu tíðindini skulu verða, skal tað veruliga verða eitt deyðsfall oman á teir sorgarleikir, ið longu hava verið, áðrenn nakað hendir.

Miðvágs Kummuna og Ferðslunevndin hava havt málið til viðgerðar og vilja fegnir fáa hetta upp á pláss, so at tað verður trygt at búgva í Miðvágs-bygd, men avarðandi almennir myndugleikar (eftir hvat eg skilji) tykjast ikki sum at hetta hevur skund.

Sjálvur skal eg siga, at eg var nær við at verða trektur (”sugaður”) av gongubreytini undir ein langan treylara, men eg fekk tíanbetur fatur í einum stakitti á garði sum var rundan um eini sethúsum fram við høvuðsvegin, men tá eg var komin upp á aftur beinini varð bilurin longu einar 500 til 800 m longur frammi so eg hevði ikki møguleikan at síggja nr. plátuna. Hugsið tykkum um hetta var eitt lítið barn sum kom út fyri hesum (sum so skjótt kann henda), hevði tað verið á lívið ídag, neyvan.

Hetta er ikki eindømi, nógv óhapp hava verið á landsvegnum í Miðvági. Tí er tað »beklagiligt« at stjórin í LV ikki sær Miðvág sum eitt av fyrstu dømunum at gera nakað munagott. Sera langt strekkið, nógv børn, langur teinur frá skúlanum á Giljanesi heim til bygdina og gjøgnum bygdina. Hesin teinur hevur verið í fleiri ár, og øll ferðslan gongur gjøgnum bygdina sum fer til flogvøllin, »men hetta hevur ikki so nógv at siga ella hvussu«, verður bara hildið at vágafólk eru so tolin ella hvussu.

Hvussu nógv skula fáa skaða ella doyggja?

Ella liva í støðugum vanda í daglidegnum?

Hvør hevur ábyrgdina?

Hvar vóru hesi eletronisku vegaskiltini at síggja fyri nú langari tíð síðan (gottnokk í eldri útgávu)? Var tað ikki við Ellis- og Avleimisheimið og yvir av FK í Miðvági, ella minnist eg skeivt?

Hvar eru tey í dag?

Men nú fær LV tað at ljóða sum hetta er nakað nýtt og revulusionerandi innan Føroyska ferðslu, har kunnandi fundir mega haldast o.a.

Søldafjørður, Sandavágur, Skipanes og Gøta hava hesi pláss størri tídning ella hvussu?

Hvat er munurin?

Og hvussu eru tit komnir fram til tað niðurstøðu, at tað júst skula verða hesi plássini fram um onnur, ið hava hendan tørvin?

Hetta gongur týðuliga fram í miðlunum. Sjálvur meini eg, at hetta skuldi verið at sæð allarstaðni har tørvur var á tí og ikki bara í Miðvági men eisini sum nevnt omanfyri og møguliga arðastaðni við. Men hugsið um hvussu langt strekkið er frá skúlanum á Giljanesi og til FK í Miðvági, eitt ovurhonds langt strekkið og so stórur trupulleiki av ferðsluni, serliga tá komið verður inn í bygdina. So kann eg ikki lata verða við at skriva hesar reglur.

Miðvágs Kommuna og ferðslunevndin hava gjørt nógv fyri at fáa nakað at henda viðv. ferðsluni í Miðvági at frama, síðan brævið frá undirritaða varð skrivað teimum (í nov. – des. 2004), men tað sær ikki út til at henda nakað sum helst nú vit fyrsta dagin fara inn í mai-mánað 2006.

Hví er tað so trupult at gera tað trygt í Miðvágs bygd, har sum so nóg óhapp hava verið? Er tað bara treiskleiki ella metur man at støðan er meira krevjandi aðrastaðni, sjálvt um øll ferðsla til og frá flogvøllinum hevur koyrt gjøgnum hesa bygd + alla aðra ferðslu nú í nógv, nógv ár. Viðmerkjast skal at stórur partur av hesi ferslu er stór tung fersla og hópur av persónbilum, (stórir bilar, treylarar, lastbilar, bussar og kassalastvognar við annhangara).

Ikki geva løgregluni ábyrgdina, tí teir gera sítt eftir teimum resursum teir hava at arbeiða við her vesturi, ella ferðslunevndini her vesturi ella Miðvágs Bygdaráðið ábyrgdina sum nú síðan nov. – des 2004 tá brævi bleiv sent teimum hava arbeitt við hesum (hetta ífylgi upplýsingum eg havi fingið frá Miðvágs Kommunu), tí hetta er eina og aleina lands- og politisk ábyrgd, ein fløkja av eini aðari verð.

Eg kann enda við at spyrja landsmynduleikan um nakað varandi bleiv gjørt hesum viðv. gjøgnum bygdina í Miðvági tá Vágatunnilin lat upp?

Nú er tørvurin at gera nakað skjótt, bara blivin somikið nógv, nógv størri. Hjálpi mynduleikunum á staðnum at fáa hesi viðurskiftir ílagi áðrenn tað endar heilt galið.

# Viðvíkjandi snelluveiðu á Føroya Banka

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Til munnligan fyrispurning frá mær í Løgtinginum upplýsti Bjørn Kalsø landsstýrismaður, at tað í fiskiloyvunum fyri 2002 hjá einstøkum bátum í bólki 5 stóð sama orðingin sum fyri bólk 4, nevnliga at tveir snelludagar taldu sum ein fiskidagur. Hetta var eitt misstak segði landsstýrismaðurin, og ongar broytingar í lógarverki ella kunngerðum vóru gjørdar fyri hesar bátar, undantikið niðurskurðin 10% árliga í tvey ár.

Sum eg havi fingið upplýst, og sum Mortan Johannesen útróðrarmaður eisini váttaði í lesarabrævi, so hava menn, ið eiga bátar í bólki 5, líka til miðskeiðis í 2005 fiskað og fráboðað til fiskiveiðueftirlitið í tí trúgv, at tveir snelludagar taldu sum ein útróðrardagur.

Mortan setti eisini í lesarabrævinum nakrar spurningar, ið eg enn ikki havi sæð svaraðar millum annað spurningin, um hesir bátar høvdu fiskað ólógliga?

Landstýrismaðurin nevndi trupla umsiting, tí bátarnir í bólki 4 hava sínar fiskidagar, meðan bólkur 5 hevur felags dagatal, og fullriknir útróðrarbátar í hesum bólki hava hægri dagatal á innaru leiðunum.

Á bankanum er ásett dagatal fyri hvønn bátin og tað kennist ikki sørt ørkymlandi, at bátur í bólki 4 við 8-10 snellum fær tveir dagar við snellu fyri ein fiskidag íalt 26, men um fiskifarið hoyrir til bólk 5 og hevur 4-5 snellur, so telur hvør dagur sum ein heilur fiskidagur av tillutaðu 13 døgunum. Hetta kann fáa tað óhepnu avleiðing, at menn heldur velja at fylla smærru førini við línu, fyri at fáa sum mest burturúr. Tað kann verða vandamikið fyri manningina og økir almikið um trýstið á fiskastovnin.

Snellan er bílig í rakstri, brúkara og umhvørvisvinarlig og fer harafturat væl við fiskastovninum; tí verður hesin veiðuháttur loyvdur á gýtingarleið.

Um fiskað verður 3-4 dagar hvønn túr, og ein fiskidagur fer í sigling, verður í besta føri talan um 3 túrar á Bankan fyri bátarnar í bólki 5.

Stór og kostnaðarmikil krøv viðvíkjandi sendara og trygdarútgerð verða sett til bátarnar, ið fáa bankaloyvi.

Hví ikki hava eina treyt í loyvinum sum ásetur, at tá bátar í bólki 5 eru til fiskiskap á Bankanum, skulu minst tveir verða í fylgi.

Í vár eins væl og undanfarin ár, leitaðu nógvir fullriknir útróðrarbátar heilt sunnan úr Suðuroynni og Sandoynni til Eiðis, Fuglafjarðar, Klaksvíkar og aðrastaðni at royna eydnuna á Norðhavinum. Neyvan nakrantíð í nýggjari tíð hava snellubátarnir fingið so lítið burturúr várfiskiskapinum sum í ár. Nógvir av hesum útróðrarmonnum seta nú álit sítt til tað, sum fiskast kann hesar dagarnar á Bankanum.

Hesir spurningar verða ikki settir fyri at minka um dagatalið hjá bólki 4, tí eg eri onga løtu í iva um, at ásetingin at loyva bátunum hægri dagatal, um teir velja at royna við snellu heldur enn línu er skilagóð og lættir um veiðutrýstið. Men mín spurningur er framhaldandi, hví tillutaðir fiskidagar hjá bátum, ið royna á sama øki við sama snellureiðskapi ikki skal gerast upp á sama hátt.

# Treytir fyri eini sunnari fiskidagaskipan

KRISTIN RASMUSSEN

Vit hava í Føroyum eina fiskidagaskipan, eina sonevnda “effort” skipan. Fyri trolarar verður fiskiorkan máta í longd falda breidd falda dýpi falda fiskidagar og fyri línuskip gjørd upp sum longd falda breidd falda dýpi falda fiskidagar.

Til eina og hvørja tíð er sostatt fiskiorkan ásett sum eitt samlað tal, fiskiorkan hjá øllum skipunum løgd saman. Hvørt skip eigur so sín prosentpart av hesi fiskiorku.

Hvat hendur so um eitt skip økir um sína fiskiorku eitt nú setir størri motor í ella verður longt, uttan at henda øking verður keypt frá øðrum skipum við fiskiloyvi.

Fyri at gera roknistykkið lættari siga vit, at skipini eru 10 í tali og øll eins. Samlaða fiskiorkan er 100%. Hvørt skip eigur tí 10 %. Nú verður eitt skip longt. Vit siga at fiskiorkan hjá hesum skipinum nú verður dupult so stór 20%, rokna sum omanfyri nevnt. Samlaða fiskiorkan hjá øllum skipum tilsaman verður tí nú 110%. Longda skipið eigur:

Meðan hini skipini nú eiga:

Tað er lætt at síggja hvør er vinnarin og hvør er taparin í hesum leiki. Tí vilja allir nú økja um sína fiskiorku. Ein ósunn kapping er farin í gongd. Hvørjir verða tapararnir. Allir sum eiga skip. Nøgdin, ið kann fáast upp av grunnunum, er frammanundan so stór, sum hon kann gerast. Tí kann samlaða inntøkan ikki gerast størri. Reiðararnir fara at brúka nøgdir av peningi til púrasta einki. Í fyrsta umfari stendur ein reiðari sum vinnari og hinir sum taparar, men í longdini gerast allir taparar.

Spurningurin er so, hvør hevur ábyrgdina fyri at henda øra kapping er farin í gongd? Svarið er púra greitt og kann smíðast fast við sjey tumma seymi: landsins myndugleikar, fiskimálastýrið og løgtingið. Teir gera ikki sína umsitingarskyldu.

Her er stóri munurin ímillum okkara fiskidagskipanin og eina kvotaskipan. Fiskidagaskipanin krevur, at myndugleikarnir hava neyva stýring við fiskiorkuni annars kemur ólag í við kapping um at økja fiskiorkuna, sum ikki gevur nøkrum nakað. Við eini kvotaskipan vil reiðarin altíð optimera sína fiskiorku soleiðis, at hann fær sum mest burturúr.

Tað verður í løtuni tosa nógv um tveir trolarar, sum verða longdir, og mann hoyrir eisini um, at skilaleysa kappingin er farin í gongd, aðrir skulu eisini leingja. Fólk hava hug at ilskast inn á reiðararnar. Men kikarin er stillaður skeivt inn. Tað er ikki reiðararnar, vit skulu ilskast inn á. Teir verða allir taparanir í hesum sorgarleiki og seinni alt samfelagið, sum tað er. Tað eru landsins myndugleikar sum mugu verða sína umsitingaruppgávu vaksnir og syrgja fyri, at eingin reiðari ókeypis kann økja um sína fiskiorku. Skal fiskiorkan økjast, má tað kosta, teir mugu keypa hana frá øðrum.

Landsins myndugleikar hava hug til at gera hetta við at umsita fiskiorkuna trupult. Tað er tað ikki. Tað er bert, tá ið onkur ókeypis broytir uppá longd, breidd, dýpi ella hestakraft, teir skulu verða úti við koyrlinum.

Vónandi fáa landsins myndugleikar skjótt greitt hetta mál. Tað er avgjørt einki at bíða við. Øll bløða.

Eitt annað er, at um inntøkan skal gerast so stór sum gjørligt hjá fiskivinnuni er neyðugt hjá landsins myndugleikum hvørt ár at minka um fiskiorkuna svarandi til produktivitetsøkingina í árinum. Ikki er lætt at rokna út hvussu stór hetta tal er, men tað skal helst vera eini 5%, so fiskidagarnir skulu minkast við hesum talið hvørt ár.

Eisini í hesum føri er tað bert landsins myndugleikar sum kunnu minka um veiðiorkuna. Skipini verða noydd at brúka allar sínar fiskidagar, tí tað gera hini. So sjálvt um eitt skip, sum í fjør fiskaði í 100 fiskidagar, kundi fiska tað sama í 95 dagar í ár, so verður tað noytt at vera úti og brúka olju og reiðskap og slíta seg upp til onga nyttu, tí tað gera hini skipini eisini. Vit kundu eisini her sett eitt tilsvarandi roknistykki upp, sum tað ovast.

So Fiskimálaráð og Løgting geri tykkara skyldu.